Mál til viðgerðar: 26/04948 Fíggjarætlan 2027, Tórshavnar kommuna

Málsviðgeri: Mortan Simonsen

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Fíggjarnevndin	18.06.2026	162/26	26/04948-1
2 Fíggjarnevndin	09.09.2026	187/26	26/04948-1
3 Býráðsfundur	17.09.2026	264/26	26/04948-1
4 Byggi- og býarskipanarnevndin	28.09.2026	199/26	26/04948-1
5 Tekniska nevnd	28.09.2026	94/26	26/04948-1
6 Vinnunevndin	28.09.2026	26/26	26/04948-1
7 Náttúru- og umhvørvisnevndin	28.09.2026	55/26	26/04948-1
8 Havnanevndin	29.09.2026	44/26	26/04948-1
9 Mentamálanevndin	30.09.2026	111/26	26/04948-1
10 Tilbúgvingarnevndin	30.09.2026	5/26	26/04948-1
11 Trivnaðarnevndin	01.10.2026	41/26	26/04948-1
12 Heilsu- og eldranevndin	01.10.2026	23/26	26/04948-1
13 Fíggjarnevndin	07.10.2026	193/26	26/04948-1
14 Býráðsfundur	22.10.2026	288/26	26/04948-1
15 Tekniska nevnd	05.10.2026	97/26	26/04948-1
16 Fíggjarnevndin	17.11.2026	239/26	26/04948-1
17 Býráðsfundur	19.11.2026	297/26	26/04948-1

FÍGGJARÆTLAN 2027, TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Upprunin til málið
Fíggjarnevndin skal sambært kommunustýrislógini leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið í seinasta lagi 1. oktober. Býráðið skal síðan viðgera uppskotið tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Hetta er ein sokallað teknisk framskriving av fíggjarætlanini 2026, sum er fyrsta stigið í sambandi við fyrireikingarnar og planleggingina av fíggjarætlanini 2027 hjá Tórshavnar Kommunu.

Lýsing av málinum
Tekniska framskrivingin av fíggjarætlanini 2026 er grundað á ta vitan og teir upplýsingar, ið eru tøkir í løtuni, og tekniska framskrivingin kann býtast upp í hesar tríggjar høvuðspartar:

1. Frakskriving av kommunuskattinum og skattinum av eftirlønargjøldunum.
2. Framskriving av rakstrarútreiðslunum.
3. Virksemisbroytingar eftir 1. desember 2025, tá fíggjarætlanin fyri 2026 varð samtykt.

Ad. 1: Framskriving av kommunskattinum og skattinum av eftirlønargjøldum
Búskaparráðið metir í várfrágreiðing sínari, frá apríl 2025, at føroyska bruttotjóðarúrtøkan, BTÚ, fer at vaksa 3,3% í ársins prísum í 2027. Í játtanarkørmunum hjá landinum, eisini frá apríl í ár, verða landsskattainntøkurnar framskrivaðar við 7,9% í 2027.

Tað er rættiliga stórur munur á metta búskaparvøkstrinum hjá Búskaparráðnum í 2027 og metta vøkstrinum í landsskattinum hjá Fíggjarmálaráðnum í 2027. Hetta kemst m.a. av, at Búskaparráðið hevur gjørt nýggjar og væl hægri metinar av búskaparvøkstrinum í 2025 og 2026 í várfrágreiðingini 2026 í mun til heystfrágreiðingina 2025. Í heyst metti Búskaparráðið vøksturin í BTÚ í leypandi prísum av verða 2,0%, meðan nýggja metingin í várfrágreiðingini sigur 5,8% í 2025.

Metingin og framskrivingin hjá Fíggjarmálaráðnum av landsskattinum eitt ár fram plagar at halda betri enn framskrivingin hjá Búskaparráðnum av BTÚ, sum er munandi truplari at framskriva samanborið við landsskattin.

Flestu greinarar kring heimin vísa á, at tað er óvanliga stór óvissa knýtt at øllum búskaparligum forsagnum í løtuni. Hetta kemst serliga av kríggi, hækkandi oljuprísum, inflatión og hækkandi rentum. ECB hevur nýliga hækkað rentuna 0,25% og fleiri rentuhækkingar eru væntandi.

Stóra óvissan leggur upp til varisligar metingar av inntøkunum hjá kommununi. Í fíggjarætlanaruppskotinum 2027 verður mett, at inntøkurnar fara at vaksa 5,5% samanborið við upprunaliga samtykta fíggjarlógaruppskotið 2026.

Hetta er við óbroyttum skattaprosentið á 19% og óbroyttum barnafrádrátti á 9.000 kr.

Skatturin av eftirlønargjøldum verður tó mettur at vaksa meira enn 7% í 2027 samanborið við upprunaliga fíggjarætlanina 2026, men frá 2027 og árini frameftir fer vøksturin í skattinum av eftirlønargjøldum at fylgja vøkstrinum í vanliga lønarskattinum. Hetta kemst av, at eftirlønarskattaprosentið nú er komið í eina fast legu.

Ad 2: Framskriving av rakstrarútreiðslum
Samlaðu rakstrarútreiðslurnar eru býttar sundur í lønir og rakstrarútreiðslur annars. Tað eru bert lønarútreiðslurnar av samlaðu rakstrarútreiðslunum, sum eru framskrivaðar í hesi fyrstu teknisku framskrivingini hjá kommununi. Lønirnar eru framskrivaðar við 4% frá FÆ-2026 til FÆ-2027. Hetta er grundað á væntaða vøksturin í sáttmálalønunum.

Ad. 3: Virksemisbroytingar
Virksemisbroytingarnar snúgva seg um lógarbroytingar og býráðssamtyktir eftir at fíggjarætlanin fyri 2026 varð samtykt umframt avleiddar broytingar í rakstrinum frá avhendaðum íløgum. Samanlagt kosta virksemisbroytingarnar, eftir at fíggjarætlanin fyri 2026 var samtykt, 45,5 mió. kr. Størstu virksemisbroytingarnar stava frá øktum virksemi undir greinunum børng & ung, undirvísing og almanna & heilsumál.

Mett úrslit av rakstrinum í 2027 eftir tekniskar framskrivingar
Í hesi fyrstu teknisku framskrivingini av FÆ-2026, sum er fyrsta grundarlagið undir fíggjarætlanini 2027 vaksa inntøkurnar 5,48% og rakstrarútreiðslurnar 6,28%. Í hesi fyrstu teknisku framskrivingini vaksa rakstrarútreiðslurnar sostatt meira enn mettu inntøkurnar. Tórshavnar Kommuna hevur vanliga sett sær sum innanhýsis mál, at rakstrarútreiðslurnar skulu vaksa minni enn mettu inntøkurnar.

Í hesi teknisku framskrivingini eru 281.726 t.kr. eftir til skattafíggjaðar íløgur í 2027. Tá er Tórshavnar Havn tikin burtur úr framskrivingini.

Skjøl
-Tíðarætlan Fíggjarætlan 2027
-Teknisk framskriving av FÆ-2026

Tilmæli:
Kunnað verður um málið.

Fíggjarnevndin 18. juni 2026: Framlagt.

Ískoyti:
Fyrsta tekniska framskrivingin av rakstrinum til fíggjarætlanina 2027 varð løgd fyri fíggjarnevndina til kunningar tann 18. juni 2026. Eftir hetta hevur umsitingin dagført búskaparmetingina og gjørt metingarnar neyvari við nýggjastu tølunum, sum eru tøk í løtuni. Nýggj inntøkumeting er gjørd. Lønarlistar umframt yvirlit yvir nýtt samtykt virksemi og lógarbroytingar eru dagførdar.

Sí talvuna niðanfyri til fíggjarætlan 2027.

1.000 kr.		Roknskapur 2025	Ætlan 2025	Ætlan 2026	Ætlan 2027	Broyting 2026/2027 pct.	kr.
Inntøkur							
20501	Kommunuskattur	1.153.244	1.099.983	1.158.556	1.220.000	5,30%	61.444
20601	Felagsskattur	71.666	58.000	58.000	60.000	3,45%	2.000
20502	Húsaleiguskattur	1.268	1.000	2.000	2.000	0,0%	0
20801	Skattur af eftirlønarinngjøldum	248.847	231.376	265.000	285.000	7,5%	20.000
20802	DIS, FAS og frádráttir	35.322	35.322	34.000	34.000	0,0%	0
20804	Kommunanna partur av Veiðigjaldi	697	800	800	800	0,0%	0
20805	Kommunanna partur av Tøkugjaldi	294	200	200	200	0,0%	0
20806	Tænastugjald á tóm býli	0	0	2.900	4.200	44,8%	1.300
	Inntøkur íalt	**1.511.338**	**1.426.681**	**1.521.456**	**1.606.200**	**5,6%**	**84.744**
Rakstur							
§1	Kommunal fyrisiting	109.199	106.920	113.025	120.718	6,8%	7.692
§2	Almanna- og heilsumál	341.784	354.202	370.740	390.447	5,3%	19.707
§3	Børn og ung	273.243	256.354	276.077	289.786	5,0%	13.709
§4	Undirvísing	59.564	57.753	61.468	67.313	9,5%	5.845
§5	Mentan og frítíð	84.772	81.001	83.728	87.779	4,8%	4.051
§6	Teknisk mál	171.758	167.051	173.734	181.345	4,4%	7.611
§7	Kommunal virkir TK	102.855	102.084	104.921	110.309	5,1%	5.388
	Rakstur íalt uttan TH	**1.143.174**	**1.125.365**	**1.183.682**	**1.247.696**	**5,4%**	**64.014**
§7	Kommunal virkir TH	-48.266	-36.985	-37.975	-37.680	-0,8%	295
	Rakstur íalt	**1.094.908**	**1.088.380**	**1.145.707**	**1.210.016**	**5,6%**	**64.309**
Aðrar útreiðslur							
20101	Stuðul til rentuútreiðslur	33.650	30.000	30.000	30.000	0,0%	0
20910	Aðrar inntøkur	961	2.000	2.000	2.000	0,0%	0
	Aðrar útreiðslur íalt	**34.611**	**32.000**	**32.000**	**32.000**	**0,0%**	**0**
	Úrslit áðrenn rentur	**381.818**	**306.301**	**343.749**	**364.184**	**5,9%**	**20.435**
Rentur							
20301	Rentuútreiðslur TK	11.148	10.962	8.867	8.195	-7,6%	-672
20301	Rentuútreiðslur TH		5.037	7.250	7.808	7,7%	558
20401	Rentuinntøkur TK	0	0	0	0	0,0%	0
20401	Rentuinntøkur TH		0	0	0	0,0%	
	Rentur íalt	**11.148**	**15.999**	**16.117**	**16.003**	**-0,7%**	**-114**
	Úrslit av rakstri TK/TH	**370.670**	**290.303**	**327.632**	**348.181**	**6,3%**	**20.549**
	Avdráttir TK	**15.900**	**22.733**	**20.003**	**20.219**	1,1%	216
	Avdráttir TH	**14.484**	**15.874**	**15.873**	**20.672**	30,2%	4.799
	Úrslit av rakstri TK/TH	**340.286**	**251.696**	**291.756**	**307.290**	**5,3%**	**15.533**
	Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá TK*	**306.504**	**235.622**	**276.904**	**298.090**	**7,7%**	**21.185**

Í uppskotinum til fíggjarætlan 2027 er roknað við, at kommunuskattaprosentið er 19,00% og barnafrádrátturin er 9.000 kr., ið er tað sama sum í dag. Høvuðstølini í talvuni eru býtt á kommunugreinar.

Niðanfyri er greitt nærri frá grundarlagnum og fortreytunum fyri dagførdu framrokningunum.

Inntøkumeting
Inntøkumetingin er gjørd av nýggjum í september, men hetta hevur ikki broytt metingina frá fyrr í ár.

Kommunuskattur

Við støði í teimum upplýsingum og ta vitan, sum var tøk í september 2026, verður kommunuskatturin mettur at hækka 5,3 % frá 2026 til 2027. Kommunuskatturin hækkar sostatt úr 1.158.566 t.kr. í FÆ-2026 upp í 1.220.000 t.kr. í hesum uppskotinum.

Húsaleiguskattur
Við støði í gongdini í inntøkunum frá húsaleiguskattinum í ár verður mett, at húsaleiguskatturin fer at verða 2 mió. kr. í 2026, sum er tað sama sum í FÆ-2026.

Felagsskattur
Mett verður at felagsskatturin í 2027 verður 60 mió. kr. Inntøkurnar frá felagsskattinum hevur sveiggja frá ári til ár, í FÆ26 var mett at felagsskatturin var 58 mió. kr.

Skattur av eftirlønargjøldum
Skatturin av eftirlønargjøldum er mett at hækka úr 265.000 t.kr. upp í 285.000 t.kr., sum er ein hækking á 7,5 %.

Veiðugjald
Kommunurnar fingu fyri fyrstu ferð part av veiðugjaldinum í 2025. Mett verður, at Tórshavnar kommuna aftur í ár fer at fáa á leið somu upphædd, sum í 2025 og 2026, t.e. 800 t. kr. í veiðugjaldi.

Tøkugjald
Kommunurnar fingu fyri fyrstu ferð part av tøkugjaldinum í 2025. Mett verður, at Tórshavnar kommuna aftur í ár fer at fáa á leið somu upphædd, sum í 2025 og 2026, t.e. 200 t. kr. í tøkugjaldi.

DIS, FAS og frádráttir
Inntøkurnar á hesi kontuni verða mettar at verða tær somu, sum mett var í 2026, t.e. 34.000 t.kr.

Samlaðu inntøkurnar
Samanlagt hækka inntøkurnar hjá Tórshavnar kommunu 5,6% í hesum uppskotinum samanborið við FÆ-2026.

Rakstrarútreiðlsur
Vanliga mannagongdin í uppskotinum til fíggjarætlan er, at samlaði vøksturin í rakstrarútreiðslunum skal liggja innanfyri karmin av metta vøkstrinum av samlaðu inntøkunum. Hetta merkir, at í hesum uppskotinum eigur vøksturin í samlaðu rakstrarútreiðslunum í mesta lagi at vera 5,6%.

í hesum uppskotinum til fíggjarætlan 2027 er samlaði vøksturin í rakstrarútreiðslunum 5,6%.

Munandi partur av samlaðu rakstrarútreiðslunum eru lønarútreiðslur. Samlaði lønarvøksturin var stórur frá 2026 til 2027. Hetta er fyrst og fremst orsakað av stórum vøkstri í sáttmálalønunum á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Flestu sáttmálarnir við tey stóru føroysku fakfeløgini ganga út í 2026, tá skulu nýggir sáttmálar gerast.

Niðanfyri er í stuttum greitt frá broytingunum í rakstrinum á ymsu greinunum í fíggjarætlanini 2027.

§ 1 Kommunal fyrisiting:
Á grein 1 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2027 við 6,8%, svarandi til góðar 7,7 mió. kr. Broytingin er í høvuðsheitum broytingar í sáttmálalønum, men eisini dýrkandi útreiðslur til kunningartøkni og KT-trygdarskipanir.

§ 2 Almanna- og heilsumál:
Á grein 2 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2027 við 5,3%, svarandi til 19,7 mió. kr. Eldraøkið er framskrivað við sama virksemi sum í dag og bert lønarhækkanir og samtyktar virksemisbroytingar eru lagdar afturat.

Sosiala deild er tillagað. Virknisfremjandi tiltøk eru sett í verk, so deildin brúkar minni av uttanhýsis fyriskipanum, sæst hetta aftur í fíggjarætlanini fyri 2027, ið bert hevur ein lítlan vøkstur. Framskrivingin er við sama virksemi sum í dag, men sambært kunngerð er vistarhald til forsturforeldur hækkað við 625 tús.kr.

§ 3 Børn og ung:
Á grein 3 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2027 við 5,0%, Á hesi greinini er tað serliga barnatalið, sum stýrir játtanini. Nógv størsti parturin av hækkingini er lønir, sum hækka við 9.450 mió. kr. Ein annar partur, ið ávirkar, er at vøggustovugjaldið hækkar bert 1 %, svarandi til 169 kr. fyri hvørt barn í vøggustovu. Somuleiðis er starvsaldurin fyri námsfrøðingar hækkaður eitt lønarstig.

§ 4 Undirvísing:
Á grein 4 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2027 við 9,5%. Á hesi greinini er tað talið av børnum og ungum í fólkaskúlunum, sum stýra játtanini. Munandi partur av vøkstrinum í rakstrarútreiðslunum fara til Skúlan á Trøðni til heildagstilboðið.

Aftrat hesum eru tað serliga tvey økir, sum gera, at raksturin á skúlunum hækkar. Allir skúlaskrivarar eru umflokkaðir, haraftrat er KT útbúnaður vorðin munandi dýrari og gjald fyri KT trygd. Eisini er sáttmálin við Nám fyri undirvísingartilfar dagførdur.

§ 5: Mentan og frítíð:
Á grein 5 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2027 við 4,8%. Á Musikkskúlanum hækkar raksturin góðar 700 tús. kr., sum er afturberingin til landið vegna økt tímatal.

Inntøkugrundarlagið hjá Ítróttarannlegg er nærum burtur. Tað eru tvinnar orsøkir til tað. Onnur er, at býráðið hevur samtykt at eingi tiltøk skulu verða í hallinum og hin, at øll ítróttarfeløg í Tórshavnar kommunu skulu fáa ókeypis hallartímar. Samlað ávirkar hetta raksturin við áleið 1,5 mió. kr.

Fyri flestu stovnarnar er sama virksemi framskrivað.

§ 6: Teknisk mál:
Á grein 6 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2026 við 4,4%, svarandi til uml. 7,6 mió. kr. Har av eru uml. 3,5 mió. kr. vegna øktar lønir.

Viðmerkjast skal, at moldgoymslurnar, sum áður hava verið undir konto 7110 Renovatión nú eru komin undir grein 6.

Í 2027 eru tað serliga og stóru útstykkingarnar í Argjahaganum og í Hoyvíkshaganum, sum hava virksemisbroytingar við sær. Í 2026 blivu virksemisbroytingarnar frá Havnarvegnum við íbindingum og Húsareynstunlinum býttar í 2 til 4, soleiðis at summar av hesum virksemisbroytingunum koma inn í 2027 eisini, og aðrar koma inn í 2027-2029.

Hetta merkir øktar viðlíkahaldskostnaðir fyri kommununa. Útrokningar vísa, at um allir hesir viðlíkahaldskostnaðir til m.a. vatnveiting, kloakkir, vegir, reinhald, asfalt, kavarudding og gøtuljós vórðu innførdir í einum, hevði tað kosta 9,9 mió. kr. Í staðin verður hesin viðlíkahaldskostnaður innførdur so líðandi, soleiðis at kostnaðurin fyri 2026 var 3,6 mió. kr. og fyri 2027 verður hetta uml. 3 mió kr.

Útreiðslurnar til røkt av bygningum eru í 2019-2026 øktar 36%. Tó hava lønarvøkstur og øktir tilfarskostnaðir merkt, at neyðugt er við 16% aftrat í øktari játtan, um støði frá 2020 skal haldast. Hetta kann ikki koma undir virksemisbroyting, men ynski verður sett fram um, at játtanin kann økjast tilsvarandi, møguliga yvir eitt 2 ára skeið.

Útreiðslur til Fríðkan og viðlíkahald og røkt av kirkjugørðum økjast við 7,4%, svarandi til 1,4 mió kr., men tað er íroknað, at raksturin av moldplássunum í kommununi fer inn undir hetta økið frá grein 7. Um henda flyting ikki verður roknað við, er talan um eina netto øking á undir 4%.

§ 7: Kommunal virkir:
Á grein 7 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2027 við 5,1%, svarandi til uml. 5,4 mió. kr., tá er Tórshavnar havn ikki við.

Mett verður, at netto rakstrarinntøkurnar hjá Tórshavnar kommunu frá Tórshavnar havn fara at verða umleið 0,3 mió kr. hægri í 2027 enn tær vóru í 2026, svarandi til 0,8%. Væntað netto úrslit er 37,7 mió kr.

Kommunala brennistøðin fer at kosta Tórshavnar kommunu 4,6% meira í rakstri í 2027 enn í 2026. Hetta er mest vegna lønarhækkingar og at nýggjur sáttmáli um ruskinnheintan kemur í gildið í oktober 2026. Hetta er eisini íroknað, at raksturin av moldplássunum er farin undir grein 6.

Brandstøðin fer at kosta 10,6% meira í rakstri í 2027 enn í 2026. Hetta yvirskipað vegna øktar útreiðslur til leigu av nýggjum sløkkibili, og vegna øktan kostnað til tilfar og útgerð.

Bussleiðin fer at kosta 3,3% meira í 2027 enn 2026, og er hetta mest vegna útreiðslur í samband við indeksregulering av sáttmálanum við veitaran.

Skattafíggjaðar íløgur

Í hesum uppskotinum eru góðar 298 mió. kr. eftir til skattafíggjaðar íløgur. Tórshavnar kommuna byggir nýtt Røktarheim á Stórubrekku, tí fer størsti parturin av íløguætlanini komandi ár til almanna og heilsumál. Íløgur verða somuleiðis gjørdar í børn og ung, undirvísing og mentan. Peningur verður settur av til Oyggjaleikir 2027. Innan tekniska øki verða størstu íløgurnar m.a. gjørdar í átøk innan orku og umhvørvið, kloakk og spillivatnsætlan, og renovatión.

Tilmæli:
Sambært kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið innan 1. oktober.

Býráðið skal viðgera uppskotið til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.

Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember. Stjórnin mælir fíggjarnevndini til at leggja fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið.

Fíggjarnevndin 09. september 2026: Framlagt.

Býráðsfundur 17. september 2026: Framlagt.

Byggi- og býarskipanarnevndin 28. september 2026: Framlagt.

Tekniska nevnd 28. september 2026: Tikið av skrá orsakað av vantandi upplýsingum í fíggjarpostum fyri tekniska økið á íløgusíðuni.

Vinnunevndin 28. september 2026: Framlagt.

Náttúru- og umhvørvisnevndin 28. september 2026: Framlagt.

Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við framløgdu fíggjarætlan.

Havnanevndin 29. september 2026: Framlagt.

Mentamálanevndin 30. september 2026: Framlagt.

Bergur Robert Dam Jensen ger vart við at vantandi hølisviðurskiftini við vøggustovuna í Kollafirði, er ynskiligt at neyðuga fíggingin finst í fíggjarætlanini.

Annfinn Brekkstein ynskir vindverju í vøggustovuni á Velbastað.

Tilbúgvingarnevndin 30. september 2026: Framlagt.

Trivnaðarnevndin 01. oktober 2026: Framlagt.

Heilsu- og eldranevndin 01. oktober 2026: Framlagt.

Tekniska nevnd 05. oktober 2026: Framlagt.

Fíggjarnevndin 07. oktober 2026: Uppskot til íløguyvirlit varð lagt fram.

Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, samtykti at taka undir við uppskotinum til fíggjarætlan og beina málið í býráðið til fyrstu viðgerð.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Birgir Nielsen, tekur støðu á seinni fundi.

Býráðsfundur 22. oktober 2026: Málið varð samtykt við fyrstu viðgerð við sjey atkvøðum fyri, seks atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Bergur Robert Dam Jensen, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Málið beint til aðru viðgerð.

Ískoyti:
Eftir at uppskotið til fíggjarætlan varð lagt fram til 1. viðgerð í býráðnum tann 17. september 2026 hevur uppskotið verið til politiska viðgerð í øllum faknevndunum í býráðnum.

Rakstrarúrslitið verður nú mett til 373 mió.kr. í hesum uppskotinum, ið verður sent til 2. viðgerð samanborið við 364 mió.kr. í uppskotinum, sum varð lagt fram til 1. viðgerð tann 17. september 2026.

Fíggjarætlan 2027 - Uppskot

1.000 kr.		Roknskapur 2025	Ætlan 2025	Ætlan 2026	Ætlan 2027	Broyting 2026/2027 pct.	Broyting 2026/2027 kr.
Inntøkur							
20501	Kommunuskattur	1.153.244	1.099.983	1.158.556	1.220.000	5,30%	61.444
20601	Felagsskattur	71.666	58.000	58.000	65.000	12,07%	7.000
20502	Húsaleiguskattur	1.268	1.000	2.000	2.000	0,0%	0
20801	Skattur af eftirlønarinngjøldum	248.847	231.376	265.000	291.000	9,8%	26.000
20802	DIS, FAS og frádráttir	35.322	35.322	34.000	38.000	11,8%	4.000
20804	Kommunanna partur av Veiðigjaldi	697	800	800	800	0,0%	0
20805	Kommunanna partur av Tøkugjaldi	294	200	200	200	0,0%	0
20806	Tænastugjald á tóm býli	0	0	2.900	4.200	44,8%	1.300
	Inntøkur íalt	**1.511.338**	**1.426.681**	**1.521.456**	**1.621.200**	**6,6%**	**99.744**
Rakstur							
§1	Kommunal fyrisiting	109.199	106.920	113.025	122.568	8,4%	9.542
§2	Almanna- og heilsumál	341.784	354.202	370.740	390.067	5,2%	19.327
§3	Børn og ung	273.243	256.354	276.077	295.186	6,9%	19.109
§4	Undirvísing	59.564	57.753	61.468	68.413	11,3%	6.945
§5	Mentan og frítíð	84.772	81.001	83.728	86.369	3,2%	2.641
§6	Teknisk mál	171.758	167.051	173.734	177.881	2,4%	4.147
§7	Kommunal virkir TK	102.855	102.084	104.921	113.194	7,9%	8.273
	Rakstur íalt uttan TH	**1.143.174**	**1.125.365**	**1.183.682**	**1.253.677**	**5,9%**	**69.995**
§7	Kommunal virkir TH	-48.266	-36.985	-37.975	-37.680	-0,8%	295
	Rakstur íalt	**1.094.908**	**1.088.380**	**1.145.707**	**1.215.997**	**6,1%**	**70.290**
Aðrar útreiðslur							
20101	Stuðul til rentuútreiðslur	33.650	30.000	30.000	30.000	0,0%	0
20910	Aðrar inntøkur	961	2.000	2.000	2.000	0,0%	0
	Aðrar útreiðslur íalt	**34.611**	**32.000**	**32.000**	**32.000**	**0,0%**	**0**
	Úrslit áðrenn rentur	**381.818**	**306.301**	**343.749**	**373.203**	**8,6%**	**29.454**
Rentur							
20301	Rentuútreiðslur TK	11.148	10.962	8.867	8.532	-3,8%	-335
20301	Rentuútreiðslur TH		5.037	7.250	7.808	7,7%	558
20401	Rentuinntøkur TK	0	0	0	0	0,0%	0
20401	Rentuinntøkur TH		0	0	0	0,0%	
	Rentur íalt	**11.148**	**15.999**	**16.117**	**16.340**	**1,4%**	**223**
	Úrslit av rakstri TK/TH	**370.670**	**290.303**	**327.632**	**356.863**	**8,9%**	**29.231**
	Avdráttir TK	**15.900**	**22.733**	**20.003**	**20.219**	1,1%	216
	Avdráttir TH	**14.484**	**15.874**	**15.873**	**20.672**	30,2%	4.799
	Úrslit av rakstri TK/TH	**340.286**	**251.696**	**291.756**	**315.972**	**8,3%**	**24.215**
	Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá TK*	**306.504**	**235.622**	**276.904**	**306.772**	**10,8%**	**29.867**

Dagførda inntøkumetingin er soljóðandi.

§ 20 Inntøkur

Dagførda inntøkumetingin í uppskotinum til 2. viðgerð verður uppskrivað við 15.000 tús. kr. samanborin við inntøkumetingina í upprunaliga uppskotinum til fíggjarætlan.

Tað eru felagsskatturin, skatturin av eftirlønargjøldum og flytingarnar frá landinum fyri DIS, FAS og frádráttum, ið verða uppskrivað við ávikavist 5.000 tús.kr, 6.000 tús.kr og 4.000 í nýggjastu inntøkumetingini til 2. viðgerð av uppskotinum til fíggjarætlan 2027.

Broytingarnar av rakstrarútreiðslunum eru soljóðandi.

§ 1 Kommunal fyrisiting (rakstur)
Í broytingaruppskotinum til 2. viðgerð verður kommunal fyrisiting uppraðfest við tilsamans 1.850 t.kr. Her fara 500 t.kr. til meirkostnaðin til eitt samskiftisfólk afturat til stjórnarskrivstovuna. 500 t.kr. fara til at gera eina dagførda visión fyri Tórshavnar kommunu. 200 t.kr. fara til meirkostnaðin til ein fíggjarfulltrúa til trivnaðarfyrisitingina. 200 t.kr. fara til meirkostnað til eitt starvsfólk afturat til byggimálsviðgerð. KT-trygdin verður uppraðfest við 550 t.kr. og á umboðanar- og tiltakskontuni verða spardar 100 t.kr.

§ 2 Almanna- og heilsumál (rakstur)
Í broytingaruppskotinum til 2. viðgerð verða samlaðu rakstrarútreiðslurnar til almenna- og heilsumál minkaðar við 380 t.kr. Her eru tað serliga útreiðslurnar til barnaverndar- og fosturfamiljuøkini, sum vera mettar at kunna minka við ávikavist 2.000 og 2.500 t.kr. Av tí at tilboðið til frontaldemens ikki kemur at virka heilt í 2027 verður játtanin til frontaldemens somuleiðis minkað við 500 t.kr.

Í hesum broytingaruppskotinum verður lagt upp til at fáa 330 t.kr. meira í hægri brúkaragjøldum fyri matartænastu, reingerðartænastu, virkisvenjingarstovu og rehabilitering.

Tað eru eisini uppraðfestingar í hesum uppskotinum. Heimatænustarnar verða uppraðfestar við fleiri rutum svarandi til 1.500 t.kr. 1.200 t.kr. fara til nýtt leigumál hjá sosialu deild. Miðstovan á Lágargarði er blivin til demensdeild og verður tí uppraðfest til demensnormering 1.150 t.kr. Fyri at tryggja og betra visitatiónina verður visitatiónin uppraðfest við 700 t.kr. Stuðul til Headspace á 300 t.kr. og øktur stuðul til hitastovuna á Herberginum við 100 t.kr.

§ 3 Børn og ung (rakstur)
Í broytingaruppskotinum til 2. viðgerð verða samlaðu rakstrarútreiðslurnar til barna- og ungdómsøkini uppraðfestar við 5.400 t.kr. Hetta er serliga til lønarframskrivingar á tilsamans 3.900 t.kr. á økjum, har lønarjáttanin ikki hevur verið dagførd, og tí hava hesi øki koyrt við stórum framfluttum hallum í fleiri ár. Harumframt fara 2.000 t.kr. til nýggja serstovu og 500 t.kr. verða spardar við at bjóða vørur og tænastur út á barnaansingarøkinum.

§ 4 Undirvísing (rakstur)
Í broytingaruppskotinum til 2. viðgerð verða samlaðu rakstrarútreiðslurnar til undirvísingarøkið upprøfestar við 1.100 t.kr. Her verður ein nýggj matarskipan upprøfest við 2.000 t.kr. umframt 100 t.kr. til leigu av báti til NámX. Ætlanin er eisini at spara 500 t.kr. við at bjóða vørur og tænastur út á skúlaøkinum, og játtanin til aðrar útreiðslur á skúlaøkinum verður minkað við aðrar 500 t.kr.

§ 5 Mentan og frítíð (rakstur)
Í broytingaruppskotinum til 2. viðgerð verða samlaðu rakstrarútreiðslurnar til mentan og frítíð minkaðar við 1.410 t.kr. Hjá Tórshavnar kvøldskúla verða 1.500 t.kr. fluttar frá rakstri til íløgur og 63 t.kr. koma inn við hægri brúkaragjøldum. Høli í Hoydølum verða ikki leigað í 2027 og tí verður játtanin til Mentanarhøli í miðbýnum minkað við 510 t.kr. Útboð av reingerð og sápu fer væntandi at minka nettoútreiðslurnar á mentanar- og frítíðarøkinum við 500 t.kr. Í svimjihøllini verður miðað eftir at fáa fleiri vitjandi. Hetta fer væntandi at geva 521 t.kr. í meirinntøkum í hesum uppskotinum samanborið við uppskotið, ið varð lagt fram til 1. viðgerð. Hægri brúkaragjøld á musikkskúlanum og á býarbókasavninum fara at geva tilsamans 66 t.kr.

Tað eru eisini upprøfestingar til mentan og frítíð í hesum uppskotinum, ið verður lagt fram til 2. viðgerð. Rakstrarstuðulin til ítrótt og Føroya Symfoniorkestur hækka við ávikavist 1.000 t.kr. og 150 t.kr. Verkætlanarstuðulin til mentan hækkar 200 t.kr., 200 t.kr. fara til at seta ein savnsvørð til Tórshavnar býarsavn umframt 200 t.kr., sum fara til mentanarvikuna.

§ 6 Teknisk mál (rakstur)
Í broytingaruppskotinum til 2. viðgerð verða samlaðu rakstrarútreiðslurnar til teknisk mál minkaðar við 3.464 t.kr. Hægri íbindngargjøld fyri vatnveiting og kloakk fara væntandi at geva ávikavist 300 t.kr. og 1.800 t.kr. 1.500 t.kr. verða fluttar asfaltskontuni yvir á íløgur. Leigan av traðum og urtagarðsstykkjum verður hækkað og hetta fer væntandi at geva 414 t.kr. í meirinntøkum.

Fyri at basa hóttanina av innræsnum plantum verður játtanin til hetta endamálið hækkað við 150 t.kr. samstundis sum 400 t.kr. verða lagdar afturat til fríðkan í hesum uppskotinum samanborið við uppskotið, ið varð lagt fram til 1. viðgerð.

§ 7 Kommunal virki (rakstur)
Í broytingaruppskotinum til 2. viðgerð verða samlaðu rakstrarútreiðslurnar til kommunal virki upprøfestar við 2.885 t.kr. Bussleiðin fær 2.500 t.kr. meira til fleiri kvøldtúrar. Játtanirnar til vinnutiltøk, Hugskotið og Visit Tórshavn hækka við ávikavist 250 t.kr., 100 t.kr. og 185 t.kr. Ætlanin er at fáa 150 t.kr. í meirinntøkum við hækka gjøldini fyri parkeringsloyvi í hesum uppskotinum samanborið við uppskotið, ið varð lagt fram til 1. viðgerð.

Tá rentur og avdráttir eru drignar frá rakstrarúrslitinum verða 307 mió.kr. eftir til skattafíggjaðar íløgur í 2027. Og tær verða raðfestar soleiðis:

Íløguætlan 2027		
Deild		**2027**
		F
§2	**Almanna- og heilsumál**	**165.000**
2375	Tannlæknamiðstøð	2.000
2775	Nýtt røktarheim við røktaríbúðum	156.000
2775	Eldradepil í Kollafirði	4.000
2775	Dagføringar, eldraøki	3.000
§3	**Børn og ung**	**15.500**
3175	Tillagingar á dagstovnaøkinum	4.000
3175	Frítíðarskúlin við Eysturskúlan	7.000
3175	Dagstovnur og frítíðarskúli, Kaldbak	1.000
3175	Dagføring av spæliplássum	3.500
§4	**Undirvísing**	**30.500**
4175	Heildarumvæling av Argja skúla	21.000
4175	Hoyvíkar skuli, høvuðsumvæling og dagføring	5.500
4175	Dagføring av skúlum og spæliplássum	4.000
§5	**Mentan og frítíð**	**18.800**
5175	Musikkskúlin	1.500
5275	Kvøldskúlin	2.500
5775	Frælsur ítróttur, høli	800
5775	FC Hoyvík og 3.-6. flokstilboð	4.000
5775	Oyggjaleikir 2027	5.000
5775	Ítróttaranlegg, ovari vøllur	5.000
§6	**Teknisk mál**	**64.000**
6175	Høvuðsumvøling Steinatún	3.000
6177	Íløgur í orku og umhvørvisátøk	20.000
6275	Lendisgøtur	3.500
6275	Torg á Argjum	3.000
6275	Miðstaður Nólsoy	1.500
6275	Fríðkan av býnum, Hoyvík	3.000
6275	Vesi í Mylnugøtu	2.000
6275	Býarlist	1.000
6875	Kloakkir og spillvatnsætlan	18.000
8175	Gongu- og súkklubreytir og atkoma	3.000
8175	Vegagerð Gerðisbreyt Velbastað	1.000
8175	Parkering	1.000
8175	Vegaverkætlanir	4.000
§7	**Kommunal virki**	**13.000**
7175	Renovatión	13.000
	Samanlagt TK	**306.800**
7475	Tórshavnar havn	18.600
	Samanlagt	**325.400**

§ 2 Almanna- og heilsumál (løgur)
Í 2027 fer størsti parturin av løgujáttanum til almanna- og heilsumál. 156.000 t.kr. eru settar av til framhaldandi bygging av røktarheiminum á Stórubrekku, sum væntandi verður liðugt tíðliga í 2028. 4.000 t.kr. eru settar av til fyrireika eldradepil í Kollafirði, byggiskrá og projektering, meðan 3.000 t.kr. skulu brúkast til dagføringar á eldraøkinum m.a. tilmælir, sum eldraráðið hevur gjørt, umframt ábøtur á eldrastovnum, har tørvur er á dagføringum. 2.000 t.kr. eru settar av til at fyrireika nýggja tannlæknamiðstøð til barnatannrøktina.

§ 3 Børn og ung (løgur)
Tilsamans 15.500 t.kr. eru settar av til íløgur á barna- og ungdómsøkinum í 2027. Næstan helmingurin fer til Frítíðarskúlin við Eysturskúlan. Síðan koma tillagingar á dagstovnaøkinum við 4.000 t.kr. og 3.500 t.kr. til dagføringar av spæliplássinum á dagstovnaøkinum. 1.000 t.kr. eru settar av til dagstovnin og frítíðarskúlan í Kaldbak.

§ 4 Undirvísing (løgur)
Á undirvísingarøkinum eru 21.000 t.kr. settar av til framhaldandi heildarumvæling av Argja Skúla. 9.000 t.kr. settar av til dagføringar av skúlum og spæliplássum í 2027. Av hesum fara 5.500 t.kr. til høvuðsumvæling av Hoyvíkar skúla.

§ 5 Mentan og frítíð (løgur)
Í 2027 eru tilsamans 18.800 t.kr. settar av til íløgur á mentanar- og frítíðarøkinum. Oyggjaleikir og ovari vøllur fáa hvør sínar 5.000 t.kr. 4.000 t.kr. fer til hølisumstøðurnar hjá FC Hoyvík umframt 3.-6. flokstilboð í somu hølum. Kvøldskúlin fær 2.500 t.kr., musikkskúlin fær 1.500 t.kr. og 800 t.kr. fara til høll til frælsan ítrótt.

§ 6 Teknisk mál (løgur)
Tilsamans 62.000 t.kr. eru settar av til teknisk mál í 2027. Av hesum fara 20.000 t.kr. til orku og umhvørvisátøk. Hildið verður fram við at leggja kommunalar bygningar um til grønar orkukeldur. Har hetta fellur saman við dagføringar av somu bygningum, verður samstundis bjálving o.a., sum minkar um orkutørvin framt.

Átøk, har kommunan kann gera íløgur fyri at minka um CO_2 útlátið í sínum dagliga virksemi kann heilt ella lutvíst fíggjast av hesum 20.000 t.kr. Átøk, ið verða mett, at fremja umhvørvispolitikkin hjá kommununi kunnu somuleiðis heilt ella lutvíst, fíggjast av hesum 20.000 t.kr.

Kloakk- og spillvatnsætlanin fer við 18.000 t.kr. í 2027. Arbeiðið at fremja spillvatnsætlanina heldur fram. Havleiðingar í Havn verða longdar út á streymasjógv. Átøk verða gjørd til at minka um trýstið á eldri leiðingar í miðbýnum umframt umleggingar til aðrar leiðir.

Tilsamans 11.000 t.kr. eru settar av til fríðkan av kommununi í 2027. 3.500 t. kr. fer til lendisgøtur. Upphæddin skal nýtast til at gera nýggjar lendisgøtur ella til at endurbyggja gøtur, ið eru ov illa farnar av áarføri. 1.500 t.kr. fara til miðstaðarøki í Nólsoy. 3.000 t.kr. er sett av til Torg á Argjum. Torg og uppihaldsøki verður staðsett og planlagt á Argjum. Verkætlanin skal standa klár til 200 ára hátíðarhaldið 9. mai 2028. 3.000 t.kr. fara til

Karlamagnusarbreyt í Hoyvík umframt savningarstað við Mylnutjørn. 2.000 t.kr. fara til vesi í Mylnugøtu.

Tilsamans 9.000 t.kr. fara til vegakervið. 1.000 t.kr. fara til at bøta um parkeringsviðurskiftini í miðbýnum. 4.000 t.kr. fara til nýgerðir á veganetinum. 3.000 t.kr. fara til gongu- og súkklubreytir umframt atkomu. Vegamót skulu tillagast til ábæra ferðslu og ferðandi við skerdum førleikum. Umstøður hjá ábæru ferðsluni skal skipast betri og tryggari. Tað skal vera betri samanhangandi undirstøðukervi til ábæru ferðsluna og greiðari skilnaður skal ver millum hørðu ferðsluna og ábæru ferðsluna. 1.000 t.kr. skulu brúkast til at gera Gerðisbreyt í Velbastað lidna.

§ 7 Kommunal virki
Tilsamans 13.000 t.kr. eru settar av til Kommunal virki í 2027. Henda játtanin fer til framhaldandi dagføring og endurgerð av brennistøðini, endurnýtsluni, tangatømingini og jarnplássinum. Harumframt verður endurnýtsluplássið í Hesti dagført.

Fíggjarnevndin 17. november 2026: Samtykt at beina málið í býráðið til aðru viðgerð.

Býráðsfundur 19. november 2026: Birgir Nielsen legði fram broytingaruppskot um at lækka kommunuskattin 0,25% svarandi til 16 mió. kr., at verða fíggjað av 6177 íløgur í orkuátøk.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við tveimum atkvøðum fyri, átta atkvøðum ímóti og trimum
blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Birgir Nielsen og Høgni Vilhelmsen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja
Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Kári Johansen.

Blankt atkvøddi: Bergur Robert Dam Jensen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein.

Síðani varð atkvøtt um fíggjarætlanina, ið var einmælt samtykt.